FØÐINGAR

23. juli fingu Helena Gaard og Leif Bjarning, Keypmannahavn ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3440 gr.

1. aug. fingu Dorit og Esbern Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4750 gr.

6. aug. fingu Sigrid og Jóannis Fonsdal, Keypmannahavn, ein son, ið hevur fingið navnið Andreas. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4300 gr.

8. aug. fingu Annelisa og Dan Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 2995 gr.

9. aug. fingu Sonja J. Ravnsfjall og Eyðun Kjølbro, Klaksvík, ein son. Hann var 60 cm. langur og vigaði 5765 gr.

10. aug. fingu Kristina og Ronnie Háfoss, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3900 gr.

10. aug. fingu Sigrun og Arni Davidsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3575 gr.

13. aug. fingu Ingunn og Per Danielsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4400 gr.

14. aug. fingu Beinta Hoydal Joensen og Ragnar Joensen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3600 gr.

15. aug. fingu Joan og Terji Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3950 gr.

16. aug. fingu Jónfríð Hansen og Magni Fjallstein Petersen, Skálabotn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3400 gr.

Her sigur Julian errin við litlabeiggja sínum, hann bleiv føddur 27. juli og vigaði hann tá 3320 og var 50 cm. langur. Foreldrini eru Laila og Jan Dam, Perth, Australia.

ANDLÁT

8. august
Kirsten L. Pind, Norðragøta, 68 ár

9. august
Hugo Frits Hansen, Nes, 72 ár

10. august
Kraus Joensen, ættaður av Selatræ, 84 ár
Arne Olsen, Vágur, 61 ár

11. august
Amy Hjelm, ættað úr Klaksvík, 81 ár
Arngrím Reinert, Tórshavn, vanliga nevndur Gimme, 80 ár

12. august
Jona Johansen, ættað úr Syðrugøtu, búsitandi í Havn, 65 ár

13. august
Oluf Arne Thomsen, Hvalba, 69 ár

14 august
Fía Egholm, Vestmanna, 88 ár

15. august
Símun Petur Dalheim, Norðragøta, 92 ár

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 18. aug.: Georg Egholm, tlf. 448016
Sunnudagin 19. aug.: Georg Egholm, tlf. 448016

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

TILTØK

Gudstænastur
10. sunnud. e. trinitatis

Havnar kirkja: kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 altarg., Sonja Klein
Vágur: kl. 11, Erland Beder
Kunoy: kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
Christianskirkjan: kl. 11, lestur
Vesturkirkjan: kl. 11, Heri Joensen
Viðareiði: kl. 11,
Hvannasund: kl. 12, altarg., Elsa Funding
Sjóvar kirkja: kl. 11, altarg., Jógvan Fríðriksson (talvan gongur fyri ljóðføri)
Gásadalur: kl. 11,
Mykines: kl. 18, David Johannesen
Haldórsvík: kl. 11, altarg., Svend Taulborg og Martin R. Jacobsen
Norðskála: kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 messa (útvarpað). Emil Olsen
Leirvík: kl. 11, altarg.,
Funningsfjørður: kl. 16 altarg., Uni Næs
Hvalba: kl. 12, Ólavur Rasmussen
Gøta: kl. 11, Jónsvein Bech
Sandur: kl. 12, Jákup R. Hansen

Kirkju- og missiónshúsið á Árgjum

Sunnukvøldið kl. 17.30 bønarløta, kl. 18 møti v/Herluf Heinesen. Mikumorgunin kl. 7 bønarløta. Heimasíða okkara: www.koma.fo

Adventkirkjan

Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Ódeyðiligleiki, ein gáva frá Gudi. Kl. 11 gudstænasta, J. V. Danielsen.

»Tíð til Gud«

Vit koma saman úti í Pállsstovu sunnukvøldið kl. 21. Evni: Kristus gevur spenning í lívið. Eisini fara vit at hyggja at vetrarskránni. Drekkamuður aftaná. Verið hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Tórshavn

Leygardagin kl. 11 útifundur. Sunnudagin kl. 11 og 18 møti. Elisabeth og Sámal Jákup Joensen leiða og tala.

Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin kl. 17.30 í Hoyvíkar skúla bøn og kl. 18 møti har Jón Joensen av Strondum talar. Útimøti verður sunnukvøldið – um viðrar. Øll eru vælkomin.

Ebenezer

Sunnudagin kl. 10: breyðbróting, kl. 18: evangel. møti, kl. 21: útimøti. Mikukvøldið kl. 20 bønar- og uppbyggingarmøti. Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Meinigheitshúsið

Sunnukvøldið kl. 18: møti við Regin Olsen.

Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 11 morgunmøti v/Ólavi Jacobsen, kl. 18 kvøldmøti, útisetar skipa fyri, kl. 22 útimøti v/Evangeliihúsinum. Mánakvøldið kl. 20 bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Hvítusunnusamkoman

Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel

Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

Saron, Vestmanna

Sunnudagin kl. 18: evangel. møti við dópi. Mánakvøldið kl. 20: bíbil- og bønarmøti.

Filadelfia, Sundalagi

Í morgin kl. 17 bønarmøti, kl. 18 kvøldmøti v/Preben Hansen.

Ørkin, Saltangará

Evangeliskt møti verður sunnudagin kl. 19 við Dánjal Gaardlykke. Húsmøti verður týsdagin kl. 20 hjá Maybritt og Trúgva Berg, Søldafjørður.

Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum

Møti verður sunnukvøldið kl. 19 við Derhard Olsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan í Skálafirði

Leygarkvøldið kl. 21 opið hús v/ Jónfinn Olsen. Sunnukvøldið kl. 17 møti við Tinu og Max. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

85 ÁR

Týsdagin 21. aug. verður Jona Winther Olsen, Vestmanna 85 ár. Dagurin verður hildin í Eldrasambýlinum í Vestmanna frá kl. 17-20.

BRÚDLEYP

Mikudagin 15. august giftust í Vesturkirkjuni Í Havn, Steinvør Magnussen, Streymnes og Birgir Dam Jacobsen, Tórshavn.

Í dag, 18. august kl. 9 giftast í Fríðrikskirkjuni á Toftum Guðni P. Petursdóttir, Toftir og Jørgen F. Andreasen, Leirvík. Br. adr.: Leirvík.

Í dag, 18. august kl. 15 giftast í Nes kirkju Gunnleyg Poulsen, Skipanes og Kim K. Jacobsen, Tåstrup. Veitslan verður fyri innbodnum á Svangaskarði kl. 18.

Leygardagin 25. august kl. 15 giftast í Leirvíkar kirkju Elsie Hansen, Leirvík og Haakon Magnus Djurhuus, Kollafjørður. Døguriði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í heiminum hjá Klaru og Torfinn Hansen kl. 21.00.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Kristus vitjar

Luk. 19,42: Hevði tú tó eisini vitað, enntá á hesum degi tínum, hvatið er tær at friði! Men nú er tað fjalt fyri eygum tínum.

Jesus sá staðin. Pílagrímsfylgið var komið upp á kambin á Oljufjallinum, og útsýnið opnaðist yvir hin halga staðin. Har lá halgidómurin við sínum veldugu forgørðum og endaleysu súlnarøðum. Gulltinnurnar á takinum glitraðu í sólini, og roykurin steig upp frá brennioffuraltarinum. Her høvdu Dávid og Sálomon tilbiðið, her hevði Jesaja profeterað. Í túsund ár hevði virksemi Guðs á fold havt miðdepil sín á hesum staði.

Men nú var tað endað. Jesus visti tað. Hann kundi síggja virkisgarðarnar frá kringseting rómverja og hoyra dunið frá brotnu tigulsteinunum. Hann visti, at halgidómurin fór at verða brotin niður, verjarnir falla fyri svørði ella verða negldir á krossi, og tey rikin í útlegd, sum komist undan. Hví skuldi tað gangast soleiðis?

»Av teirri søk at tú ikki kendi vitjunartíð tína.« Ikki skjøttaði um vitjan Guðs hjá tær. Guð er hin livandi Guð. Hann virkar við okkum. Hann virkar við hvørjum nýggjum ættarliði. Eingin kann liva upp á fedranna trúgv ella rokna sær teirra gudrøkni til góða. Vit mugu øll umvenda okkum. Kallið kemur til okkara. Og tað dugir ikki, at vit sjálvi gjørdu tað einaferð í tíð, sum farin er. Her kemur Jesus. Samkoma hansara er hitt nýggja Jerúsalem. Vit eru tað nýggja Ísrael. Duga vit at skyna á, hvatið er okkum at friði?

Tú kanst »verða eftir á vegnum«, sum ápostulin sigur. Tú kanst fara at liva upp á ársgamla fyrigeving og tráslitnar royndir. Tú stríddi teg einaferð fram til eina kristna sannføring. Tú veitst, hvatið er sannleiki, og hvatið er følsk læra. Men livi eg? Dugi eg at skilja í dag, hvatið er mær at friði? Hoyri eg, táið orðið dømir meg fyri nýggjar óvanar ella feskar forsømingar? Er tað sovorði, eg tali um í syndajáttan míni? Er náði Guðs veruliga nýggj?

Tað eru tílíkir spurningar, sunnudagsteksturin setir okkum. Kristus vitjar fólk sítt og samkomu sína. Grætur hann um okkum? Kemur hann til eitt bønhús ella til eitt ránsmannaból?

Niels Pauli Danielsen

TILTØK

Soli Deo Gloria

Mikudagin kl. 6: Bøn, leygardagin kl. 9: bøn, sunnudagin kl. 18 møti, Asta Lydersen talar. Mánadagin kl. 20 : bønarmøti.

Missiónshúsið á Tvøroyri

Sunnukvøldið verður møti kl. 18 við Ragnar Ludvig og Jeannu Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Cafe One Way, Tvøroyri

Fríggjakvøldið kl. 21 luttaka Birgit og Niclas Thomsen úr Havn.

Betel, Vágur

Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur um viðrar.
Ónskvøldið kl. 20 bønar- og uppbyggingarfundur.

Missiónshúsið í Vági

Sunnukvøldið kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sion, Vágur

Morgunmøti verður sunnudagin kl. 11 og møti kl. 18, David Bech og onnur luttaka.

Frelsunarherurin, Vági

Sunnudagin kl. 18 møti, Sigrid Ludvig og Eydna Beck luttaka. Øll eru vælkomin.

Reyði Krossur Føroya

Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 13-15.00 á tlf. 212380.

Tilhaldið

í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Dagar í viku 20.-24. aug. 2001. Øll gomul eru hjartaliga vælkomin.
Mánadagin 20. aug.
kl. 10 Vælkomin – Jákup Lindenskov form. í nevndini í Tilhaldinum
kl. 14 Fyrilestur – Arbeiðsdagurin lokin Elin Mortensen
kl. 10-12 Heðin Brú – Hanus A. Samuelsen, tilm. 316491. Heðin Brú og skaldskapur hansara (fyrilestur og prát)
kl. 15-17 Framhald, serliga um skaldsøgurnar
Týsdagin 21. aug. kl. 15-17 Framhald
Mánadagin 27. aug. Útferð í Sandoynna (tilm.)
20.-24. aug. kl. 15-17 Teldudagar – Ásmundur V. Jóhannesen (tilm. 316491).
20.-24. aug. **Prát og frásøgn** kl. 10-17 Marianna D. Dahl (tilm. 316491)
20.-24. aug. Arbeiðsverkstaður kl. 10-17 Pappírsklipp, seyming o.a. handverk í kjallaranum (tilm. 316491).
20.-24. aug. Likamsrørsla, avspenning og drama – Jórun Simonsen (tilm. 316491).
kl. 10-12 Likamsrørsla og avspenning
kl. 14-17 Drama.
23. aug. Fyrilestur (alm.) kl. 15 Sálarligar broytingar í aldurdóminum – Sofus Joensen, sálarfrøðingur.
Møguleiki er at keypa døgurða allar dagarnar (tilm. 316491). Somuleiðis drekkamunnur við heimabakaðum.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn – gongutúrur

Sunnudagin 19. august verður gongutúrur niðan á Stødlafjall og Stórafjall, tó um viðrar verður farið niðan á Sneis. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Havið heit og góð gongukleði og matpakka við. Tilmelding.

AA-fundir í Havn

Reinsaríið, Tórsgøta 5: Roykfríur AA-fundur leygarmorgunin kl. 9-10. Leygardagin kl. 17-18. Sunnudagin kl. 11-12.

AA-kvinnufundur í Havn

Opin AA-kvinnu fundur í Havn sunnukvøldið kl. 20 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5.
VBA (vaksin børn av alkoholikarum) ella ørkymlandi familjuumstøður. **Opin** fundur sunnudagin kl. 17 á Reinsaríinum, Tórsgøta 5.

AA-fundur í Eysturoy

Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíðin).

AA-fundir í Vágum

Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Føroya Heimavirkisfelag

Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn

hevur summarfrí frá 28.6. til 3.9.

LFÚ-skrivstovan

hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA

skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið

svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International, Føroya deild

Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn uttanlands

tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

MBF

Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00. Vit hava stongt vegna summarfrí frá 5. juli til 15. august.
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail:
mbf@post.olivant.fo

Giktafelag Føroya

Skrivstovan er stongd í summarfrítíðini. Lýst verður tá opið verður aftur.

Lymfødemfelagið

Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Javni

Hoydalsvegur 40
3. hædd (ovast).
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 10-14. Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

Felagið Føroyar-Kuba

P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Deyvafelag Føroya

Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo heimasíðan: www.deaf.fo

Føroya Astma/Allergifelag

MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419

Køliakifelag Føroya

Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Nýrafelagið

Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

Føroya Felag Móti Krabbameini

Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail:
ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya

Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Evangeliska Røddin, Odense

Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyska sendingin »v/ Betesdabrunnin«

er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10 og verður endursend sunnukvøld kl. 20.30.

Malta, Hirtshals

Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

Kristnastova

Birmavej 36, København S, tlf. 32551809 fax.32586149
e-mail:
kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20. Møti við breyðbróting er hvønn sunnumorgun kl. 11.
Sunnudagsskúli er samstundis. Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

Føroyahúsið í Keypmannahavn

Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing:
33231586
Dagliga telefonin:
33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.-frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

Før. gudstænasturnar í Samuelskirkjuni

Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14.
(Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Presturin er at hitta á tlf. 38796146.

Føroyskt møti í Ålborg

Føroysk møti eru fyrsta leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aftaná, øll eru hjartaliga vælkomin. Tit vælkomin at ringja til Annfinn Hjelm, tlf. 29725733.

Føroyskt barnamøti

Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Føroyingafelagið í Esbjerg

Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg,
tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyingafelagið í Odense

hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C. Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

Føroyingafelagið við fjørðin

Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438
Gudni tlf. 47387748

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark

Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt (donsk tíð).

Føroyingafelagið í Århus

Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Húsið er opið mánadag til hósdag kl. 16-18 og fríggjakvøld kl. 21-03. Føroysku bløðini liggja frammi. Kaffi er ókeypis. Flogbóltur í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16-18. Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30. Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag (ólíka vikur) frá kl. 11-14.

Føroyingafelagið í Svøriki

Vit hava tiltøk nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Annu Westfahl á tlf. +46176269536 ella Innu Törnroos á tlf. +468853570